# Parkeringin skal skipast betur



**Forboð er nú sett fyri langtíðarparkering inni í Eiðis bygd**

KOMMUNA
*Snorri Brend*

**Eiði:** Á seinasta fundi sínum samtykti bygdaráðið á Eiði at taka eitt stig til at betra um parkeringina.

Hetta stigið merkir aftur, at lýst er forboð fyri langtíðarparkering í bygdum øki í kommununi.

Forboðið kom í gildi 1. juni og er galdandi fyri øll akfør yvir 3,5 tons.

Ístaðin fyri at parkera inni í bygdini, verður víst til parkeringsøkið á havnarlagnum.

*Nú sleppa bert smærri bilar at parkera inni í Eiðis bygd*

# »Ren Grafiq« í Smiðjuni



*Marianne Toftum hevur gjørt hesa myndina*

**Hósdagin letur upp ein framsýning við orginalgrafikki í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin er opin fram til týsdagin í næstu viku**

LIST
*Snorri Brend*

Tað er verkstaðarfelagsskapurin »Ren Grafiq« sum stendur fyri framsýningini. Í hesum felagsskapi eru í alt 13 grafikkarar, ið veruliga brenna fyri grafikki.

Í framsýningini vísa donsku grafikkararnir teirra hugsan um nútíðar grafikk, sum fevnir um alt frá eksperimenterandi spæli við formum og litum til tey meiri klassisku úttrykkini.

- Við framsýningini vóna vit at skapa áhuga fyri møguleikunum at úttrykkja seg gjøgnum grafikk, verður sagt.

Miðað verður eisini eftir at fáa eitt samstarv í lag við føroysk listafólk.

Tey 13 listafólkini eru:

Hanne Axelsson, Birgith Themberg Anthon, Karen Backhaus, Susanne Dyhre-Poulsen, Ingrid Fuglsang, Suzanne Gravesen, Dorte Gudmundsson, Charlotte Grangaard Jensen, Anne Houe, Inger Margrethe Knudsen, Pernille Mejslov, Jorun Shah og Marianne Toftum.

Tað serstaka er, at tær báðar seinast nevndu hava føroyskar røtur.

# Leirvíkingar á fólkaatkvøðu

**Fríggjakvøldið var eykabygdarráðsfundur í Leirvík, har bygdarráðið samtykti at koyra málið um veg til og úr Norðoyartunlinum gjøgnum Leirvík til vegleiðandi fólkaatkvøðu**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leirvíkingar skulu nú á fólkaatkvøðu um vegaføringina til og úr Norðoyatunlinum.

Hetta samtykti Leirvíkar bygdarráð á eykabygdaráðsfundi í Leirvík fríggjakvøldið.

Sambært einmæltu samtyktini í bygdarráðnum verður fólkaatkvøðan týsdagin 8. juli.



*Nú skulu leirvíkingar á fólkaatkvøðu um vegaføring*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Á atkvøðuseðlinum verða tveir spurningar at taka støðu til í sambandi við ferðsluna til og úr Norðoyatunlinum.

Bygdarráðið hevur samtykt, at spurningarnir verða hesir:

* Niðri í bygdini (soleiðis sum løgtingið hevur samtykt)
* Uppi á Brekkum (sambært uppskoti hjá Selmar Nielsen, arkitekti)

**Eingin brúgv**

Onkur hevði kanska væntað, at spurningurin um brúgv millum pierarnar eisini fór at gerast ein valmøguleiki á eini fólkaatkvøðu, men hesin er ikki við í samtyktini hjá Leirvíkar bygdarráð.

# Skúlin í Fuglafirði umvælast

Tann elsti parturin av skúlanum í Fuglafirði skal umvælast sum skjótast, tí serfrøðingar hava staðfest, at ein skúlastova er illa fongd við soppi. Hinvegin vístu kanningarnar eisini, at hinar stovurnar og hava so at siga ongan sopp, skrivar Kringvarp.fo. Fuglafjarðar skúli hevur leingi ætlað at umvæla eldru partarnar av skúlabygninginum. Øll vindeygu verða skift, og leitað verður eftir lekum, sum kunnu hava verið atvoldin til soppavøksturin. Stovan, ið er fongd við soppi, skal ikki takast í nýtslu aftur, fyrr enn vissa er fingin fyri, at viðurskiftini aftur eru í lagi, hevur Fuglafjarðar kommuna gjørt greitt.